# NSÍ smurdi meistararnar av

**Skerda HB man sjáldan hava havt so lítið at bjóða upp á, sum teir høvdu leygardagin, tá ið teir í Runavík onga løtu góvu teimum frið og heilt kroystu teir**

NSÍ-HB
*Jóannes Hansen*



*Christian Høgni Jacobsen úr NSÍ og Svenn Jacobsen úr HB dystast um bóltin. Við tveimum málum syrgdi Christian Høgni fyri, at runavíkingar koppaðu føroyameistar-unum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

NSÍ hevur tvær ferðir fyrr í ár verið í Gundadali og tapt fyri HB. Leygardagin fingu teir endiliga møguleikan á heimavølli at vísa HB, hvar skápið skuldi standa, og teir við Løkin tóku sanniliga av.

NSÍ spælararnir vóru frá fyrsta bríksli ágangandi og umhugsnir, meðan HB avrikið var alt annað enn at rópa hurrá fyri - hvørki á vøllinum ella á beinkinum.

Sjálvandi var tað stórur smeitur, at miðverjarnir báðir - Jóhannis Joensen orsaka av skaða og Rasmus Nolsøe orsaka av leikbanni - ikki vóru tøkir, og at liðformaðurin Rúni Nolsøe ikki var á miðvøllinum.

Á útivølli í Runavík átti at verið upplagt fyrst at syrgt fyri tyngd og trygd í miðverjuni. Hallur Danielsen og Svenn Jacobsen vóru settir at røkja ódnirnar. Hallur plagar at vera vonverji ella miðvallari í borðunum, og hann treivst einki serligt í óvanda leiklutinum. Bárður Mortansson treivst heldur einki serligt í miðvallarplássinum, sum Jákup á Borg (hann var vongverji og skuldi byrgja fyri Jónstein Petersen) plagar at røkja, og ófriðurin mistrivnaður kring vøllin kendist eitt sindur óneyðugur, tá ið tað var veruleiki, at HB á liðnum hevði tveir teir stinnastu miðverjarnar í landinum. Men teir vóru í øðrum plássum - Vagnur Mohr Mortensen á sentrala miðvøllinum og Hans á Lag í álopinum.

NSÍ fekk beinanvegin um endan, sjálvsálitið vaks, Jústinus R. Hansen og Dánial Hansen settu seg á týdningarmikla sentrala partin av vøllinum, Óli Hansen og Viggo Johannesen høvdu tak á HB álopsspælarunum.

Einasta ferðin, tað luktaði av vandastøðu, var, tá ið Hans á Lag ikki so langt undan hvíldini royndi móti málinum, men tá varð blokerað.

Hóast HB spælið higartil í ár einki hevur verið at reypa av, so hava teir kortini víst serstøk evni at fóta sær og koma afturíaftur. Tað hevur kortini bilað meiri á útivølli, enn tað hevur gjørt í Gundadali, og hesa ferð talaði einki fyri - absolutt einki! - at tað skuldi eydnast. Men leingi var munurin bara eitt mál, og harvið var stríðið púra opið, inntil tað restaðu fimm minuttir.

Í tíðini, sum finski dómarin hevði lagt afturat, varð Tór-Ingar Akselsen skumpaður um koll í brotsteiginum. Rókur Jespersen var tryggur, tá ið hann tók sær av brotssparkinum, og so lúrdi møguleikin, at tað kortini skuldi eydnast HB at tiltuska sær eitt stig, sum teir á ongan hátt høvdu átt uppiborið, men tá ið NSÍ hevði givið bóltin upp aftur, bríkslaði dómarin fyri síðstu ferð.

### Christian Høgni í hopla

NSÍ hevur so ofta áður havt gott tak á HB, og soleiðis var tað eisini hesa ferð. Tað var eingin ivi um, hvør tað var, sum valdaði á vøllinum. Tá ið havnarmenninir onkra ferðina ikki gyppaðu, men royndu at mynda álop, vóru teir strípututu ógvuliga ágangandi, og so vendist spælið skjótt, tí teir á meistaraliðnum vóru ikki førir fyri at varðveita bóltin í egnari røð.

NSÍ hevði í løtum gott tak á samanspælinum. Teir gjørdu nógv færri persónlig mistøk, enn teir á mótstøðuliðnum gjørdu, og teir vóru nógv stinnari at sekta persónligu mistøkini, enn mótstøðumenninir vóru tað.

Helgi L. Petersen var í álopinum saman við Christian Høgni Jacobsen. Landsliðsspælarin var serliga stinnur, og um Bárður Johannesen hesa ferð ikki hevði havt verið so stinnur millum HB stólparnar, so kundi landsliðsmaðurin havt skorað uppaftur fleiri mál enn tey bæði, sum hann var meistari fyri.

Tað fyrra fekk Christian Høgni, tá ið tíggju minuttir vóru farnir. Andy Olsen serveraði bóltin, Christian Høgni smoygdi sær framvið tveimum tøvandi mótstøðumonnum, áðrenn hann gjørdist einsamallur við HB málverjanum og setti bóltin framvið honum.

Hjá NSÍ var tað ikki nóg sannførandi, at teir ikki megnaðu at staðfesta sigurin, fyrrenn tað restaðu fimm minuttir. Teir høvdu í hvussu so er møguleikarnar til tað.

2-0 málið var Christan Høgni, ið nú tykist vera rættuliga komin fyri seg aftur eftir skaðan, sum so leingi helt honum burtur, aftur meistari fyri. Eftir uppspæl í vinstru og sending frá Jónsteini Petersen gjørdist álopsspælarin leysur um brotsteigarmarkið, og so sendi hann í málið.

HB brotssparkið pyntaði eitt sindur um, men tað tók ikki burtur heildarmyndina, sum segði, at meistararnir á als ongan hátt vístu meistaraspæl, og at NSÍ hevur lagt so mikið bragdligа fyri eftir summarsteðgin, at tað nú er møguleiki fyri hvørjum sum helst hjá teimum!

## Fakta um dystin

**NSÍ-HB 2-1 (1-0)**
**1-0:** Christian Høgni Jacobsen 19.
**2-0:** Christian Høgni Jacobsen 85.
**2-1:** Rókur Jespersen br 90.
**Dómari:** Tony Asumaa úr Finnlandi
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen, Einar Hansen - Andy Olsen, Jústinus R. Hansen, Dánial Hansen, Jónstein Petersen - Christan Høgni Jacobsen, Helgi L. Petersen
**Gult kort:** Jens Martin Knudsen, Christian Høgni Jacobsen
**HB:** Bárður Johannesen - Jákup á Borg, Hallur Danielsen, Svenn Jacobsen, Janus M. Joensen - Bárður Mortansson (Hendrik Rubeksen, 73.), Kári Nielsen, Vagnur Mohr Mortensen, Tór-Ingar Akselsen - Rókur Jespersen, Hans á Lag
**Gult kort:** Hans á Lag, Vagnur Mohr Mortensen, Kári Nielsen

## Trygvi var nøgdur við pressspælið

**NSÍ venjarin heldur, at heilivágurin hjá hansara monnum eigur at vera, at teir bara fokusera upp á eina avbjóðing í senn og ikki hugsa ov langt fram í tíðina**

NSÍ UNDANVINDUR
*Jóannes Hansen*

NSÍ venjarin, Trygvi Mortensen, var ovurfegin eftir, at tað endiliga eydnaðist at fáa fulla úrtøku móti HB, sum NSÍ tvær ferðir fyrr í ár hevur tapt ímóti.

- Vit ætlaðu at pressa teir frammi á vøllinum. Tað ætla vit hvørja ferð, tí teir trívast ikki undir sovornum trýsti. Men tað eydnast ikki altíð. Hesa ferð eydnaðist tað sera væl, og vit fingu dystin at myndast soleiðis, sum vit høvdu vónað og ætlað. Bara spell at vit ikki fingu fleiri mál, tí tað hevði verið heilt burtur við, um teir høvdu fingið stig burturúr, heldru Trygvi Mortensen.

Hann fegnast serliga um, at ferð rættuliga er komin á Christian Høgni Jacobsen, eftir at hann hevur stríðst við at koma fyri seg. Hann sleit krossbandið í fjør.

- Christian Høgni hevur verið sera miðvísur og treiskur. Tað er kanska ikki altíð so hugaligt at venja á vetri og í ikki serliga góðum líkindum. Tað hevur Christian Høgni gjørt, og nú vísti hann seg aftur at vera orduliga á toppinum. Tað fegnist eg um.

Hvussu verður nú?

- Úrslitið á Skála lagaði seg væl fyri okkum. Vit eru fýra stig frá teimum báðum fremstu. Vit skulu spæla móti B36 á heimavølli, og tað er hesa uppgávuna, sum vit hava fokus á. Tað verður nógv tosað og mett um vánirnar fyri hesum og hasum. Hjá okkum ræður um at halda okkum til næstu avbjóðingina, og hon er móti B36. Tann dystin gleða vit okkum til, sigur Trygvi Mortensen.

### Reytt kort?

Christian Høgni Jacobsen hevði fingið gult kort fyrr í dystinum. Tá ið hann skoraði seinna málið, var hann so fegin, at hann rullaði troyggjuna upp um høvd. Tað tyktist sum um, at dómarin hevði hug at fara eftir gula kortinum. Sambært ásetingar-nar skal spælari, sum letur seg úr troyggjuni í fagnaði yvir mál, síggja gult!. Um Christian Høgni hevði fingið gula kortið í hesum førinum, so hevði hann verið rikin av vøllinum, og so hevði hann ikki verið tøkur móti B36. Men hann slapp við skrekkinum - um hann í gleðisrúsinum legði til merkis, hvussu nær hann var einum gulum korti afturat!